VIÐAREIÐIS KOMMUNA

FO- 750 Viðareiði · T-postur: vid.kommuna@kallnet.fo
Tel: +298 451083 · Fax: +298 451094

## Lýsing eftir stuðli í farloyvisstarv til barn við serligum tørvi

Viðareiðis Kommuna søkir eftir stuðli at byrja 16/8 2007 og árið út, til 9 ára gamlan drong við serligum tørvi.

Starvið er eftir skúlatíð uml. frá 12.30 og er umleið 17 tíma um vikuna.

Arbeiðsuppgávan er at skapað umstøður so drongurin kann mennast kropsliga, málsliga, sosialt og mentalt.

Neyðugt er at umsøkjarin hevur bil so barnið kann koma til ymisk tiltøk.

**Vit ynskja at tú:**

- brennur fyri uppgávuni
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og tekur ábyrgd
- vilt samstarva við foreldur, børn, starvsfelagar og ymsar fakbólkar, ið eru knýttir at barninum.
- ert tolin
- ert áhugað/ur í at geva barninum ein mennandi gerandisdag

Lønin verður eftur sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pædagogfelag og lønt sum pedagogur/hjálparfólk á bústovni.

Um spurningar eru til starvið, ber til at venda sær til dagrøktarleiðarin á tlf. 588053

Umsóknin við møguligum prógvum/viðmælum skal verða okkum í hendi **í seinasta lagið 22. juni** og verður send til:

**Viðareiðis Kommunu**
750 Viðareiði

BAKKAFROST

## Brúkt flakalinja til laks til sølu

8 skeripláss, beinpilkimaskinur, flakavskari og div. bond.

Alt úr rustfríum stáli

**Meiri fæst at vita frá P/F Bakkafrost, tlf 405000**

VR BILAR

## Goymslulærlingur

VR-Bilar søkir eftir Goymslulærlingi (Kvinna/Maður) til eykalutagoymsluna, at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarin skal helst hava FHS og fyrimunur er um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við teldum. Umsøkjarin skal vera fyrikomandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Skriftlig umsókn skal sendast til:

**VR-Bilar Sp/f**
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-100 Tórshavn

Meir fæst at vit, við at venda sær til Marna Olsen á telefon 215 099.

**VR-Bilar** selur bilar av merkinum Volvo, Renault og Chevrolet. Afturat goymsluni er eisini bilasøla og persónbilaverkstaður. Á VR-Bilum starvast í løtuni 14 fólk

VOLVO · CHEVROLET · RENAULT

## Skúlin á Trøðni

**Størv til komandi skúlaár**
**1 lærarastarv,** fast starv
**1 lærarastarv,** tíðarmarkað
til komandi skúlaár. Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Lærarafelag.

**1 pedagogstarv,** tíðarmarkað
til komandi skúlaár. Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

**1 starv sum hjálparfólk,** fast starv
Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

**Vit vænta tú hevur**
- Útbúgving/royndir
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt og við hugflogi eftir støði barnanna
- Verur við til at menna skúlan

Skúlin á Trøðni er serskúli, tekur sær av børnum við serligum tørvi.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 20. juni 2006.**

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til skúlastjóran, Jan Christiansen, tlf. 314522 ella 280025

**Skúlin á Trøðni**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196

## Starvsfólk til Starvsmannafelagið

**Starvsmannafelagið søkir eftir starvsfólki til umsiting felagsins at byrja eftir avtalu.**

**Uppgávu:**
Starvsmannafelagið er í holtur við at menna felagið og sóknast tí eftir fólki, ið við ágrýtni og fakfelagsanda skal røkja áhugamál felagsins og verða viðspælari hjá nevnd og tæna limum felagsins. Tú kemur at starvast í umsiting felagsins og eisini taka lut í dagliga umsitingarliga arbeiði felagsins. Høvuðsdentur verður lagdur á uppsøkjandi arbeiði, tiltøk í húsum okkara og vera við til at stinga út í kortið framtíðarhugsjónir felagsskapi okkara at gagni.

**Førleikar:**
Vit leita eftir einum starvsfólki við kunnleika til og áhuga fyri fakfelagsarbeiði, ið eisini hevur góð samstarvsevnir og hevur lætt at samskifta. Kravt verður, at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti.

Fyrimunur er at hava umsitingarligar royndir, góðan telduførleika, umframt góðan kunnleika til enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð. Vit bjóða eitt livandi og avbjóðandi starv við menningarmøguleikum, har tænasta og limarøkt er í hásæti.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknin skal vera Starvsmannafelagnum í hendi 1. juli 2007. Merkið brævbjálvan: **Umsókn.** Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gunnleiv Dalsgarð, formann felagsins á tlf. 314868.

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn.**

**Starvsmannafelagið** er stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum við uml. 1900 limum, sum starvast í teimum 4 sáttmálaøkjum felagsins, Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, S.E.V og Føroya Tele (Føroya Arbeiðsgevarafelag), felagið hevur í dag tilsamans 116 álitisfólk á arbeiðsplássunum innan sáttmálaøkini. Starvsmannafelagið gevur út Starvsblaðið og hevur umframt kunning á heimasíðu felagsins www.starvsmf.fo. Í umsiting felagsins starvast formaður og skrivari felagsins.

